# Stórur eftirspurningur eftir summarhúsum




*Tær tríggjar Jenny Tirri, ið er Nordjobbari úr Finlandi, Thora Augustinussen og Ann Mari Ellingsgaard taka ímóti teimum mongu ferðafólkunum, ið koma inn á gólvið á Kunningarstovuni í Havn.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Á Kunningarstovunum kring landið siga tey seg hava úr at gera við at útvega ferðafólki og føroyingum summaríbúðir, meðan tað hinvegin gongur striltið við at selja fyriskipaðar útferðir**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hetta er tíðin, at fyrstu ferðafólkini koma til landið. Norrøna er farin undir summarsigling sína, og nógv fólk koma eisini loftvegis til Føroya. Somuleiðis leggja nógv ferðamannaskip leiðina fram við okkara lítla oyggjasamfelag, og í ár hava meiri enn 40 slík boðað frá, at tey koma á vitjan. Eitt tað fyrsta, ið tey mongu ferðafólkini ger, tá ið tey koma til landið, er at leita sær inn á eina av nærmastu kunningarstovunum fyri at kanna, hvørji tilboð eru til ferðafólk.

### Nógv størri eftirspurningur eftir summarhúsum

Á Kunningarstovuni í Runavík, sum saman við Kunningarstovuni í Fuglafirði tekur sær av ferðafólkakunning í Eysturoynni, verður sagt, at tað eru nógv fleiri hús útleigaði til ferðafólk í ár í mun til í fjør. Leiðarin á Kunningarstovuni í Runavík, Rannvá Troest, sigur, at tað er sera stórur áhugi millum ferðafólk fyri summaríbúðum, meðan tað hinvegin gongur eitt sindur meiri striltið at fáa fólk at gista á hotellunum.

Eisini á Kunningarstovuni á Tvøroyri merkja tey ein týðuligan vøkstur í eftirspurninginum eftir summarhúsum. – Tað hevur verið stórur eftirspurningur eftir húsum, og til dømis høvdu vit væl kunna brúkt eini 10 hús afturat á páskum, so stórur var eftirspurningurin, sigur Poula Strøm, leiðari, sum fegnast um, at tað er eitt støðugt vaksandi tal av føroyingum, sum velja at ferðast í egnum landi og tískil spyrja eftir húsum at leiga í eitt styttri tíðarskeið. – Tað gleðiliga er eisini, sigur Poula, at fólk nú velja at steðga eitt sindur longur í oynni, enn hvat tey gjørdu fyrr. Nú gista fólk altíð í minsta lagi tríggjar nætur, áðrenn tey fara av aftur oynni, sigur leiðarin á Kunningarstovuni á Tvøroyri.

### Nokk av íbúðum í Havn

Í høvuðsstaðarøkinum hava tey tó ikki havt nakran serligan vøkstur í eftirspurninginum eftir íbúðum. Ann Mari Ellingsgaard á Kunningarstovuni í Havn sigur, at tað er kanska eitt lítið sindur størri eftirspurningur, men ikki nakað nevnivert. Á Kunningarstovuni í Havn eru tey í teirri hepnu støðu, at tey hava ovmikið av íbúðum at bjóða fram. – Okkum tørvar ikki fleiri íbúðir í Havn, sigur Ann Mari og leggur afturat, at tey hava verið noydd til at avvísa fleiri fólkum, sum hava vent sær til kunningarstovuna og bjóða eina íbúð hjá sær fram, tí annars verður ov lítið í part hjá teimum, sum leiga út.

Ein annar gistingarháttur, ið verður ferðafólkini fáa bjóðað, er bed and breakfast ella Ból og Biti, sum tað eisini verður rópt á føroyskum. Á hesum øki er áhugin tó minkandi, verður sagt á teimum trimum omanfyri nevndu kunningarstovunum, hóast útboðið er rímuligt.

### Lítil áhugi fyri útferðum

Í nógv ár hava kunningarstovurnar kring landið skipað fyri útferðum fyri ferðafólki, men seinnu árini tykist áhugin fyri hesum útferðum at verða minkandi. Rannvá Troest á Kunningarstovuni í Runavík sigur, at á hesum økinum hava sera fáir fyrispurningar verið í ár, og støðan er tann sama í Suðuroy. Hví so er, er ilt at siga, men Rannvá Troest sigur, at nú ber betur til hjá ferðafólki sjálva at fara útferð. Millum annað útgav Ferðaráð Føroya í fjør ein faldara við møguligum gongutúrum, sum ferðafólk kunnu fara sjálvi, og hesin er nógv eftirspurdur og kærkomin hjá ferðafólki, sigur Rannvá, ið tó fegnast um, at áhugin fyri Føroyakvøldum tykist verða vaksandi. – Á Føroyakvøldunum ber til hjá ferðafólki at uppliva føroyska mentan og mat, og í ár skipa vit fyri Føroyakvøldum bæði á Selatrað, á Skála og á Glyvrum, sigur Rannvá. Leiðarin á Kunningarstovuni í Runavík greiður frá, at tað fyrsta Føroyakvøldið í ár var í gjárkvøldið, og ikki færri enn 40 ferðafólk vóru til hetta tiltak, sigur hon.

### Mest skandinavar

Nógv tann størsti parturin av teimum ferðafólkum, sum higartil í ár hava leitað sær til Føroyar, eru skandinavar, verður sagt á øllum trimum kunningarstovunum. Ann Mari Ellingsgaard á Kunningarstovuni í Havn sigur, at í ár hevur tað verið nakað minni av fólki inni á gólvinum, og at tað fyrst og fremst eru skandinavar, ið hava vitjað landið higartil, hóast nakrir bretar eisini hava verið her. Royndirnar siga tó, at nógvir týskarar eisini koma, men teir koma ofta eitt sindur seinni út á summarið, verður sagt.



# Góð úrslit hjá Tróndi og Finni

**Eftir hvat skilst, hevur gongdin hjá felagnum, Vinna í Gøtu, sum hevur trý dóttirfeløg við trimum skipum, verið rættiliga positiv í seinasta ári. Aðalfundur verður í feløgunum komandi leygardag**

SKIPARAKSTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Pelagiska vinnan gongur væl, hóast kreppa er í einum parti av vinnuni annars*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Komandi leygardag heldur felagið Vinna og dóttirfeløgini hjá hesum felag, Varðin, Krossbrekka og Gulenni, aðalfund í Gøtu.

Tað eru tilsamans ellivu parteigarar í hesum feløgum, sum hava sín uppruna í felagnum, Varðanum, sum bygdi Trónd í Gøtu.



*Jákup Jacobsen, reiðari, vil einki siga um úrslitið hjá feløgunum, fyrr enn á aðalfundinum komandi leygardag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Jákup Jacobsen, reiðari, vil ikki siga nakað um úrslitið hjá feløgunum, fyrr enn parteigararnir hava sæð úrslitið á aðalfundinum leygardagin.

Hann vísir á, at á aðalfundinum verða fýra roknskapir lagdir fram. Ein hjá hvørjum av dóttirfeløgunum og ein hjá móðurfelagnum, Vinna.

– Í roknskapunum hjá dóttirfeløgunum sæst gongdin í hvørjum felagi sær, og síðan síggjast hesir roknskapirnir eisini í roknskapinum hjá móðurfelagnum, sigur reiðarin.

Sosialurin hevur skilt, at gongdin hevur verið rættiliga positiv, og er hetta at fegnast um, nú ein partur av vinnuni annars er í tungum sjógvi.

Dóttirfeløgini hjá P/F Vinnu eiga skipini Trónd í Gøtu (Varðin), Finn Fríða (Krossbrekka) og Gulenni (Saksaberg).

Jákup Jacobsen sigur, at Saksaberg er á sildaveiði norðanfyri, og í løtuni royna teir í Svaldbardssonuni.

Hini bæði skipini, Tróndur í Gøtu og flaggskipið, Finnur Fríði, eru á rygginum millum Føroyar og Ísland.

Saksaberg fór aftur til fiskiskap um mánaðarskiftið, apríl/ mai uppá loyvini hjá Krúnuni, sum felagið hevur keypt.

Finnur Fríði, sum er bygdur á Langstein, fór til fiskiskap um ársskiftið.

# Eldrasambýlið liðugt til heystar

**Gongst, sum Leirvíkar kommuna ætlar, stendur eldrasambýlið, sum bygt verður við Ranggil í bygdini, liðugt til heystar**

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Eldrasambýlið við Ranggil í Leirvík verður liðugt til heystar. Í sambýlinum verður pláss fyri 10 búfólkum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Eldrasambýlið, sum Leirvíkar kommuna letur byggja, er nú komið so væl áleiðis, at sambýlið stendur liðugt til heystar.

Á kommunuskrivstovuni í Leirvík siga tey, at ætlanin er at taka sambýlið í nýtslu fyrst í september.

Tað eru nøkur ár, síðan kommunan setti skjøtil á at fáa bygt eitt eldrasambýli í bygdini, og í hesum sambandi er peningur settur á fíggjarætlanina hjá kommununi seinastu árini.

Sakaris Guldbro, byggifrøðingur, sum starvast hjá Leirvíkar kommunu, hevur teknað sambýlið og teir, ið standa fyri arbeiðinum, er Norðhús í Kunoy.

### 10 búpláss

Leirvíkingar lata væl at gongdini, síðan byggingin byrjaði, og nú líður so móti endanum við hesi stóru verkætlanini hjá kommununi.

Í eldrasambýlinum í Leirvík verður pláss fyri 10 búfólkum.

Tað er Heimarøktin, sum umsitir eldrasambýlini, men ætlanin hjá leirvíkingum er sjálvsagt, at heimið í fyrsta lagi skal hýsa eldri og óhjálpnum í bygdini, sum ikki kunnu vera heima.

Í eldrasambýlinum við Ranggil verður bað og wc knýtt at hvørjum kamari, og í sambýlinum annars verða felagshøli, køkur, goymsla og annað.

Í Leirvíkar kommunu fegnast tey um, at arbeiðið nú er komið so væl áleiðis, at sambýlið kann takast í nýtslu til heystar.

# Bilur út av við rundkoyringina



*Hesin bilurin lá við síðuna av vegnum omanfyri Norðskála týsmorgunin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FERÐSLUÓHAPP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsmorgunin lá hesin bilurin við síðuna av vegnum beint omanfyri rundkoyringina niðan móti Eysturoyartunlinum.

Bilurin hevur fingið onkrar skrammur, og eitt nú er síðan høgrumegin nokso illa farin, serliga hurðin øvutu megin føraran.

Hjálmurin er lyftur nakað upp, og kúfangarin sær eisini út til at hava fingið onkran stoytin.

Sosialurin fregnaðist um hendingina á løgreglustøðini í Runavík beint fyri middag í gjár, men har var eingin, sum visti nakað at siga okkum um hendingina.